

# Sløkkja ljósið leygardagin

Í morgin, 29. Mars, er altjóða ravmagns-sparidagur. Um allan heim sløkkja einstaklingar, feløg og eisini heilar kommunur ljósi ein tíma tíma hendan dagin. Tað er náttúruverndarfelagsskapurin, WWF, sum stendur aftanfyri átaki, har tey heita á alla verðina, at sløkkja ljósið millum klokkan átta og níggju leygarkvøldið.

Tað er ikki bara fyri samvitskuna skuld, at fólk taka undir við hesum átaki. Loysir tað seg peningaliga, so vilja fólk fegin spara streym, vísa kanningar.

Elsparuskinnarar eru serliga nógv eftirspurdir fyri tíðina. Við elsparuskinnarum sleppur ein undan óneyðugum orkubrúki frá tólum sum eru á stand-by. Í Danmark eru 600.000 elsparuskinnarar seldir síðani 2003.

*Kelda: Politiken*

# Kirkjan boðar umhvørvisvernd

Boðskapurin um at verja og fara væl um umhvørvið og jarðaklótuna er eisini rokkið inn um kirkjugátt. Serliga í USA eru kirkjur og samkomur farnar inn í stríðið fyri at minka um CO2 útláti.

Finnbogi Joensen, umsjónarmaður í Vestmanna Skúla, hevur nú tikið stig til ein sokallaðan grønan sunnudag í Føroyum. Trinitatissunnudag, 18. mai, er evangeliiteksturin í kirkjuni skapanin, og Finnbogi Joensen hevur heitt á kirkjur og samkomur í Føroyum um at varpa ljós á umhvørvið og umhvørvisvernd hendan dagin.

Eisini er ætlanin, at morgunlestrarnir í Útvarpinum vikuna eftir skulu vísa á sama evni.

*Kelda: Dimma*

Niðurstøðan er, at mest sannlíkt er, at norðuratlantiski streymurin viknar nakað í hesum aldaskiftinum. Tann eina framrokningin vísir eina minking á 25 prosent. Kortini hækkar hitin um okkara leiðir vegna stóru broytingarnar í hitaskipanini, sum standast av vakstrarhúsárinunum.

### Avleiðingar fyri framtíðina

Frágreiðingin metir eisini um samfelagsligar avleiðingarnar. Veðurlagsbroytingarnar ávirka heilsustøðuna hjá milliónir av menniskjum vegna vánaliga føði, hitabylgjur, yvirflóð, stormar, skógareldar og turk, umframt vatn- og insektbornar smittusjúkur. Men færri doyggja vegna ekstreman kulda.

Fleiri milliónir menniskju eru í vanda vegna vatnflóðir, serliga í tætt fólkaðum økjum, sum liggja lágt. Har eru møguleikarnir at laga seg til umstøðurnar longu smáir, vegna tropiskir stormar og aðrar avbjóðingar. Fátøk samfeløg eru serliga viðbrekin, tí tey ofta eru miðsavnað í vandaøkjum.

Fleiri enn ein sættapartur av heimsins fólki fær trupult við at vinna sær vatn, tí nógva staðni er vatnið tengt at kava og ísi. Møguleikarnir fyri at dyrka jørðina batna á norðaru breiddarstigum um heimin hitin hækkar við 1-3 stigum, alt eftir avgrøðini, men minkar, um hitin verður uppaftur hægri.

Á lægri breiddarstigum minka vakstrarmøguleikarnir, sjálvt í sambandi við smáar hitabroytingar, við størri vanda fyri hungursneyð

*Keldur:*
*www.dmi.dk*
*www.ipcc.ch*

## TACC08 í Sosialinum

**Um eina góða viku verður altjóða veðurlagsráðstevnan, TransAtlantic Climate Conference hildin í Norðurlandahúsinum. Evni á ráðstevnuni - veðurlagsbroytingar og havumhvørvi – hevur stóran týdning bæði altjóða og fyri Føroyar, og Sosialurin fer alla komandi viku at hava tema, har vit viðgera orku og umhvørvi.**

**Um tú hevur hugskot ella sjónarmið, sum er viðkomandi fyri temaði, ert tú vælkomin at skriva til post@sosialurin.fo**